# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

10. september fingu Súsanna og Niels Matrin Olsen, Strendur eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 2488 gr.

16. september fingu Durita R. og Høgni Hansen, Oyndarfirði, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3400 gr.

16. september fingu Jórun Durhuus og Roy Bláhamar, Vestmanna, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3210 gr.

17. september fingu Helena Müller og Ragnar Stakksund, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4000 gr.

18. september fingu Sunrid og Bent Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3550 gr.

19. september fingu Rannvá og Kristian Martin Skála, Argjum, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 3400 gr.

19. september fingu Lillie og Dan Eliassen, Tórshavn, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2600 gr.

20. september fingu Elisabeth J. Jacobsen og Jón Sólsker, Eiði, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3850 gr.

**70 ára føðingardagur**
23. september verður Rannvá Samuelsen, í Vági, 70 ár. Dagurin verður hildin inni á Bakka hjá Sunrid og Aksel. Opið hús frá kl. 19.00.

**60 ára føðingardagur**
Leygardagin 23. septembur verður Andrias Jensen, Skopun, 60 ár. Dagurin verður hildin í Samljóð millum kl. 16.00 og 22.00. Øll eru vælkomin.

**Brúdleyp**
Fríggjadagin 22. september giftast á Dronninglund Slot Sólvá Jacobsen, Tórshavn og Walther Skræp úr Vodskov. Brúdleypsadr.: Dronninglund Slot, Slotsgade 8, 9330 Dronninglund.

Leygardagin 23. september giftast í býráðssalinum í Havn Ruth á Bøgarði, Kaldbak, og Bjarni Samson, Tórshavn. Tey, ið vilja hitta brúðarparið, eru vælkomin inn á Bø í Kaldbak kl. 21.00.

**Konfirmantar í Fuglafjarðar kirkju**
**24. september 2006**
Dávid Højgaard, Leirvík (Konfirmatiónin hjá Dávidi verður hildin í missiónshúsinum í Leirvík), Sonja Eliasen, Karina Joensen, Katrin Fríða Jógvansdóttir, Nanný Jacksdóttir Toftegaard, Fuglafjørður (Konfirmatiónin hjá Nanný verður hildin í Lonini í Fuglafirði).

Sosialurin -har tað hendir

Richard Hammond frá Top Gear:

# Misti harradømi við 450 km/t



Programmleiðarin á kendu BBC sjónvarpssendingini Top Gear, Richard Hammond, varð í vikunu álvarsliga skaddur, eftir at hann misti harradømi á einum jetdrivnum bili við 450 km/t.

Richard Hammond var í ferð við at klára eitt ferðmet við einum jet-drivnum bili á einum flogbreyt nærhendis Leeds í Onglandi, tá hann misti harradømi á bilinum.

Sambart eygavitnum fór bilurin fleiri ferðir runt. Bjargingarlið var á staðnum beinanvegin, og 36 ára gamli Hammond var við seg sjálvan tosaði, tá hann varð tikin úr vrakinum, segði ein av sløkkiliðsmonnunum, Dave Ogden, við Sky News.

Hammond fekk ein nakkekraga setta á, og varð flogin við tyrlu til nærmasta sjúkarhús. Hóast støðan var ógvuliga kritisk, er hon stabil nú, verður sagt.

Richard Hammond er kendur frá teimum væl umtóktu Top Gear-programmunum í BBC, har hann luttekur saman við Jeremy Clarkson og James May. Hammond er eisini ein av programmleiðarunum í Discovery Channel-røðini „Brainiac".

# Ebenezerkórið í Sandoy




Sunnudagin 24. september vitjar sangkórið í Ebenezer í Sandoy.

Kl. 14.30 verður útifundur uttan fyri Føroya Banka heiman á Sandi, kl.15 syngur kórið á røktar- og ellisheiminum Áargarði, og kl. 16 á Gerðisgarði í Skálavík.

Kl. 17 verður sangfundur í Sólarris í Húsavík, har Hjalgrím Janusarsson, ið er ættaður úr Húsavík, Svenning av Lofti, Poul Jóhan Djurhuus og Solveig Arge koma at bera fram eitt stutt orð.

Eftir sangløtuna verður ein drekkamuður.

**mg**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálp, tá okkara kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Mikkjal Petur Jacobsen**
Porkeri, vanliga nevndur Petur í Fugloy

andaðist og varð jarðaður.

Takk til tykkum starvsfólk á Suðuroyar Sjúkrahúsi, sum vóru um hann til tað síðsta.
Takk til tykkum, sum mintust hann við gávum til Zarepta, kransum, blómum og telefonsamtalum.
Somuleiðis ynskja vit at takka øllum tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Frida**
**Selma, Martin og Jákup við familjum**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá góði pápi, abbi og langabbi okkara

**Olaf Johan Olsen**
á Lava

andaðist og varð jarðaður.
Takk til fyristøðukvinnu og starvsfólkini á Ellisheiminum fyri árini á heiminum.
Takk til Bjarna Bæk, dómpróst, fyri troystarrík orð.
Takk til kirkjutænarar, sangarar og gravara.
Takk fyri kransar og blómur og takk øll tit, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunna vegna*
**Thurid, Katrina og Dia**